# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sosialráðgevi til Psykiatriska depilin

Eitt fulltíðar farloyvisstarv er leyst at søkja til setan 1. oktober 2008 og eitt ár fram.

Sosialráðgevin arbeiðir í tøttum samstarvi við onnur toymi og luttekur í toymum eftir førleika, tørvi og ynski.

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennanadi tvørfakligt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum.
- góðar møguleikar fyri menning
- nógvar avbjóðandi uppgávur á einum arbeiðsplássi í menning

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- kunna ráðgeva og vegleiða sjúklingum og teirra avvarðandi um sosial viðurskifti
- verða bindilið sjúklingsins til aðrar stovnar
- verða samskipari í mun til aðrar partar í oftani torførum málum
- tryggja sosialfakliga partin í tvørfakliga samstarvinum

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum sosialráðgevi
- góð samstarvsevni, íðni, hug og dirvi til at luttaka í einum sera fjøltáttaðum arbeiði saman við øðrum fakbólkum
- royndir ella áhuga í at arbeiða við sálarsjúkum
- førleika og royndir til at fremja sjálvstøðugt virksemi
- verða við í menningini av psykiatrisku viðgerðartilboðunum
- teldukunnleika

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Tormóð Stórá, leiðandi yvirlækna á tlf. 304500, lokal 4100, e-post lstost@ls.fo ella Ann Britt Mortensen, sosialráðgeva, lokal 4176, e-post lsannmr@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 5. september 2008 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B8

Vit søkja eftir avloysarum á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum til setan 15. september 2008 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki:

- eitt avloysarastarv vegna barnsburð til og við 30. apríl 2009
- eitt avloysarastarv vegna barnsburð til og við 31. januar 2009
- eitt avloysarastarv til og við 31. desember 2008

**Arbeiðsøkið er í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til kardiologiskar sjúklingar

**Krøv til umsøkjarar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í røkt og viðgerð av kardiologiskum sjúklingum
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt, avbjóðandi og fjølbroytt umhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- innleiðslu og upplæring

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- kardiologiskar royndir
- kardiologiska eftirútbúgving

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til Poulu Jacobsen, varaleiðara á tlf. 30 45 00, lokal 6068 ella lokal 6008 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 8. september 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum (sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Skurðgongina**
Umsóknarfreistin er 25. august 2008 kl. 12.00

**Avloysari fyri deildarleiðaran á G3**
Umsóknarfreistin er 25. august 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B6**
Umsóknarfreistin er 25. august 2008 kl. 12.00

**Varaleiðari til B7**
Umsóknarfreistin er 25. august 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B7**
Umsóknarfreistin er 25. august 2008 kl. 12.00

**Deildarljósmóðir**
Umsóknarfreistin er 26. august 2008 kl. 12.00

**Ljósmøður til Ljósmøðraskipanina**
Umsóknarfreistin er 29. august 2008 kl. 12.00

**Avloysari fyri ergoterapeut**
Umsóknarfreistin er 29. august 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

· er sjúklingurin í miðdeplinum
· eru umleið 200 seingjarpláss
· eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
· eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
· eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
· er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin